# Fáa betri tænastu við at seta sparingar í verk

**Umleggingar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum føra við sær at nøkur størv verða spard burtur, men kortini fer tænastan at batna**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*At Landssjúkrahúsið er bygt út, gevur betri umstøður at tillaga virksemi og tænasturnar. Hetta førir eisini eina betri tænastu við sær, sigur stjórin á Landssjúkrahúsinum*

– Tey, sum eru innløgd á føðideildini og á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, skulu nú hava eina betri tænastu.

– Og tað kann gerast samstundis sum vit seta sparingar í verk.

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur, at tað ber til at spara, samstundis sum tænastan til sjúklingin verður betri.

Tað skulu umleggingar, sum ætlanin er at seta á verk á føðideildini og á psykiatriska deplinum, vísa.

Stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at á føðideildini bera umleggingarnar við sær, at ljósmøðurnar í størri mun koma inn á føðideildina at arbeiða, samstundis sum talið á sjúkrarøktarfrøðingum verður lækkað tilsvarandi.

Hetta er ein umlegging, sum fer at føra við sær, at eitt vaktlag av sjúkrarøktarfrøðingum verður spart burtur á føðideildini

Poul Geert Hansen sigur, at talan er um eini 5-6 ársverk. Men, hvussu nógvar uppsagnir, talan verður um, liggur ikki fast enn.

Ætlanin er eisini at royna at fáa teimum, sum brúk ikki verið fyri á føðideildini, starv aðrastaðni á Landssjúkrahúsinum.

Stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at talan er ikki um at seta fleiri ljósmøður í starv, men at brúka tær, sum eru í starvi, betri.

– Í løtuni sita ljósmøðurnar í vakt uttanfyri føðideildina og eru bara boðsendar, tá ið kvinnur skulu eiga. Og tað halda vit ikki er at fáa fulla nyttur burturúr starvsfólkunum.

Stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at umleggingarnar koma at føra við sær, at ljósmøðurnar, sum eru á vakt, taka lut í arbeiðnum á føðideildini alla tíðina.

– Hetta hevur eisini tann fyrimun við sær, at ljósmøðurnar, sum møta barnakonunum heilt frá byrjan av viðgongutíðini, eisini fáa fylgt teimum betri yvir eitt longri tíðarskeið.

Hann sigur, at hetta fer at geva barnakonunum eina betri tænasta.

Stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at ljósmøðurnar eru førar fyri at átaka sær arbeiði á føðideildini, sum sjúkrarøktarfrøðingar nú røkja.

– Men tað serliga við føðideildini á Landssjúkrahúsinum er, at har eru eisini ov tíðliga fødd børn, sjúk børn og barnakonur, sum eru sjúkar, innløgd.

– Tí er ætlanin at vit framyvir bæði skulu vera bæði ljósmøður og sjúkrarøktarfrøðingar og framyvir verður tað so, at tað verða umleið helvt um helvt jarðamøður og sjúkrarøktarfrøðingar í vakt á føðideildini.

### Leggja deildir saman

Poul Geert Hansen sigur, á psykiatriska deplinum er tað at fara undir fyrireikingarnar sum eru stungnar út í kortið í sambandi við álitið um heildarpsykiatri. Í tí sambandi er ætlanin at fáa teir sjúklingar, sum búgva fast á psykiatrisku deildunum, í egnan bústað at búgva uttanfyri sjúkrahúsið, soleiðis sum talan hevur verið um. Sum fyrireiking til hetta er ætlanin at savna allar fastbúgvandi sjúklingar á nøkrum fáum deildum.

Harafturat er lagt upp til at summar deildir skulu hava felags náttarvaktir og at tvær deildir við fastbúgvandi, skulu skipast sum ein deild.

– Tilsamans fer hetta eisini at føra við sær, at talið á starvsfólkum fer at lækka.

Men, hvussu nógv starvsfólkatalið fer at lækka, kann hann onki siga um enn.

### Skilagóðar broytingar

Poul Geert Hansen dylir ikki fyri, at fíggjarlig trongstøða er ein orsøk til hesar umleggingarnar.

Men hann leggur eisini dent á, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum ikki góðviljað hevði sett tær í verk, um talan var um eina lækking í tænastustøðinum.

Hetta er eitt lið í at menna tænastustøðið á Landssjúkrahúsinum og í hesum førum er menningin, at ljósmøðurnar fáa betri umstøður at fylgja við barnakonunum og á psykiatriska deplinum er menningin tann, at vit fyrireika okkum til at fáa sjúklingar, sum búgva fast á sjúkrahúsinum, út í egnan bústað, soleiðis sum økisterapiin og heildarpsykiatriin leggja upp til.

Samstundis er ætlanin at styrkja psykiatrisku rehabiliteringina, har ætlanin er at samskipa ergoterapi, fysioterapi og tað ambulantu psykiatrisku viðgerðina.

Poul Geert Hansen sigur politiska kravið til Landssjúkrahúsið, er, at 3,5 milliónir skulu sparast í ár.

Men tað er ikki sagt, at alt skal sparast í lønum og tí er eisini ætlanin at seta aðrar umleggingar í verk.

– Eitt nú hevur køkurin á Landssjúkrahúsinum fingið sær ein høvuðsveitara og tað hevur gjørt, at vit hava fingið rættiliga stóran avsláttur.

## Landssjúkrahúsið 9,5 milliónir í halli

**Síðani 1999 hevur landssjúkrahúsið havt tríggjar milliónir í halli um árið. men í fjør bar ikki til at klípa meiri burtur**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Berrtholdsen*
*aki@sosialurin*

Ì fjør hevði Landssjúkrahúsið 9,5 milliónir í halli.

Tað upplýsti Landssjúkrahúsið í einum í einum tíðindaskrivi frá Landssjúkrahúsinum fyrr í vikuni.

Høvuðsorsøkin er ein stórur vøkstur í útreiðslunum til heilivág, viðgerðarvørur og orku, samstundis sum fíggjarkarmurin til hetta økið hevur verið mestsum óbroyttur.

Eftir at nýbygningurin varð tikin í nýtslu, er virksemið á sjúkrahúsinum økt. Á skurðgongini eru 13% fleiri sjúklingar viðgjørdir í 2004, í mun til sama tíðarskeið í 2003. Harafturat verða fleiri krabbameinssjúklingar, sum fyrr noyddust av landinum, nú viðgjørdir í Føroyum. Øktu heilivágsútreiðslurnar komast millum annað av at nýggi og effektivari heilivágurin, sum verður nýttur, eisini er væl dýrari.

### 3 milliónir í halli um árið

Síðani 1999 hevur sjúkrahúsið havt eitt árligt undirskot upp á umleið 3 milliónir krónur. Rakstrarjáttanin hevur verið nærum óbroytt hesi árini, samstundis sum útreiðslurnar til heilivág, viðgerðarvørur og orku, eru hækkaðar umleið 15 milliónir krónur.

Hóast hendan stóra vøksturin í útreiðslunum, er árliga undirskotið ikki vaksið fyrr enn í 2004, tá tað ikki longur var møguligt at klípa burtur av ymsa staðni í rakstrinum. Og í fjør varð hallið altso 9,5 milliónir.

Fyri at javnvág aftur skal fáast í raksturin á Landssjúkrahúsinum er neyðugt við umleggingum í virkseminum í longdini og við eini hægri fíggjarjáttan her og nú. Landsstýrið hevur tí avgjørt at søkja Løgtingið um eina eykajáttan upp á 6 milliónir krónur í ár.

Restin av rakstrarundirskotinum verður fingið til vega við effektiviseringum í kjalarvørrinum av umleggingum í virkseminum á sjúkrahúsinum.

## Ætla at fáa barnakonur at liggja styttri á føðideildini

**Landssjúkrahúsið kannar nú møguleikarnar fyri at lata barnakonur liggja styttri á føðideildini**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú umleggingar skulu gerast á føðideildini, er eisini ætlanin at kanna eftir, um tað ikki ber til at barnakonur verða útskrivaðar skjótari av føðideildini, enn tær verða nú.

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsin-um, sigur, at tað er ongastaðni í londunum rundanum okkum, at barnakonur liggja í fimm dagar á føðideildini eftir at tær hava átt.

Men tað gera tær á føðideildini á Landssjúkrahúsinum og tí fara tey nú at kanna eftir um tað ber til at at barnakonurnar verða útskrivaðar skjótari.

– À føðideildini skal talið á seingjarplássum endurskoðast og dagførast, sum tað eitur í upplegginum hjá leiðsluni til umleggingarnar á føðideildini.

– Í londunum rundanum okkum eiga barnakonur næstan ambulant og í nógvum førum fara tær heim longu heim dagin eftir at tær hava átt.

Men stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at ongin avgerð er tikin um hetta enn um nakrar broytingar verða gjørdar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum í hesum sambandi.

Hann veit heldur ikki um tað rætta er í Føroyum, at barnakonur bara skulu liggja ein dag eftir, at tær hava átt, ella um tær skulu liggja longri.

– Skulu barnakonurnar útskrivast skjótari enn tær nú verða, fer tað eisini at seta størri krøv til heilsusystraskipanina og tí má greiða eisini fáast á um hon er til reiðar at átaka sær hesa eyka uppgávuna, sigur Poul Geert Hansen.